

*Monrad við steypinum, meðan KÍ-leikararnir mugu takað til takkar við silvuri*
*Mynd: nsí.fo*

## Monrad Holm Jacobsen:

# Kennist fantastiskt at vinna

Tað er altíð deiligt at vinna dystir, men tað er fantastiskt at vinna steypakappingina, segði liðskiparin hjá runavíkingum, Monrad Holm Jacobsen eftir dystin, tá Sosialurin fekk orðið á hann.

– Vit høvdu sera trupult við at fáa spælið hjá okkum at ganga í dag, men stríðsviljanum bilaði einki. Vit vóru eitt sindur heppnir til tíðir, tí KÍ hevði meginpartin av spælinum og fleiri góðar kjansir, segði Monrad.

NSÍ skoraði bæði síni mál eftir deyðbóltstøður, og metir Monrad, at tað er ein av sterku síðunum hjá runavíkingunum.

– Í hesum kappinarárinum hava vit skorað rættuliga nógv mál eftir frí- og hornaspark, og tað sást aftur í dystinum móti KÍ, har bæði okkara mál koma eftir deyðbóltstøður, segði ein fegin Monrad Holm Jacobsen at enda.

---

## Sørmund Kallsø:

# Nakað lort

– Tað er nakað lort at tapa steypafinaluna á hendan hátt, segði ein vónsvikin Sørmund Kallsø, sum sipaði til sjálvmálið, ið gav runavíkingum sigurin.

– Vit vóru klárt betra liðið, og vóru spælstýrandi so at siga allan dystin. Men allíkavæl standa vit her eftir at hava tapt steypafinaluna, og tað er ræðuligt, segði Sørmund.

Spurdur um hvat KÍ skuldi havt gjørt ørvísi, vísir Sørmundur avgjørdur á, at teir høvdu fleiri góðar kjansir, men trupulleikin var at umseta kjansirnar til mál.

– Men nú mugu vit bara reisa okkum aftur, og fara eftir føroyameistaraheitinum í unglingadeildini, segði Sørmund Kallsø at enda.

---

**KÍ - NSÍ** 1-2 (1-1) unglingar

**0-1: Árni Frederiksberg, 6.**
**1-1: Sámal Olsen, 23.**
**1-2: sjálvmál, 85.**
Dómari: Rói Jacobsen

**KÍ:** Emil Biskupstø – Ísak Simonsen, Heri K. Olsen, Sørmund Kallsø, Aksel Dalsgaard (86. min Gunnar Christiansen), Sámal Olsen, Johan Jacobsen (66. min Teitur Fles), Heðin Klakkstein, Ragnar Danielsen, Helgi Samson
**NSÍ:** Kristian Joensen – Per Langgaard, Óli Hansen, Bárður Midjord, Magnus P. Sørensen, Nemanja Koncar (90. min Hallur Højgaard), Viggo Hansen, Monrad H. Jacobsen, Áron H. Jacobsen (46. min Óli Hansen), Arni Gregersen, Árni Frederiksberg

# NSÍ vann unglingafinaluna

**UNGLINGAFÓTBÓLTUR** NSÍ vann finaluna í Thomas Dam Intersport kappingini, sum var spæld í Leirvík í gjárkvøldið. Endaliga støðan gjørdist 2-1 til NSÍ. Tað stóð leingi á jøvnum 1-1, men stutt fyri dystarlok gjørdu klaksvíkingar sjálvmál, og varð tað avgerðandi fyri dystin



*Aftast frá vinstru: Hallur Højgaard, Jógvan Eli, Bárður Midjord, Monrad H. Jacobsen, Áron H. Jacobsen, Kristian Joensen, Per Langaard, Magnus Pauli Sørensen, Kemm, Arni Gregersen og Sonni L. Petersen venjari*
*Fremst frá vinstru: Beinir, Jákup, Nemanja Koncar, Viggo Hansen, Árni Frederiksberg, Óli Hansen og Óli Hansen*
*Mynd: nsi.fo*

Ólavur Øre Hansen

Runavíkingar eru steypavinnarar í unglingadeildini í 2010. Hetta er fyrstu ferð síðani 2007 at runavíkingar hava vunnið Thomas Dam Intersport kappingina, og tað var ein fegin NSÍ liðskipari, sum Sosialurin fekk orðið á eftir dystin.

– Tað er fantastiskt at vinna steypakappingina. Sjálvt um vit als ikki spældu ein góðan dyst, so stríddust allir mans, og tað eydnaðist til endans at fáa sigursmálið, segði ein fegið NSÍ liðskipari, Monrad Holm Jacobsen

Meðan runavíkingar gleðast yvir sigurin, so eru klaksvíkingar alt annað enn nøgdir. Teir høvdu fleiri góðar kjansir í dystinum, men neyvleikin manglaði í avgerðandi løtum, og so vóru teir eisini óheppnir og gjørdu sjálvmál seint í dystinum.

– Tað er ræðuligt at tapa steypafinauna á hendan hátt. Vit eru klárt betra liðið, og komu til fleiri góðar kjansir, men klára ikki at fáa bóltin í málið. Og fyri at gera ilt verri, so tapa vit dystin uppá eitt sjálvmál, segði ein sera vónbrotin Sørmund Kallsø eftir dystin.

Samanumtikið, so hava klaksvíkingar alla grund at iðra seg um tapið. Stóran part av dystinum vóru teir leikiga omaná, og høvdu nakrar góðar kjansir, men trupulleikin var at teir ikki kláraðu at umseta kjansirnar til mál. Tá dugdu runavíkingar betri og gagnnýttu ein av sínum fáu kjansum, samstundis sum teir eisini høvdu heppnið, tá klaksvíkingar gjørdu sjálvmál seint í dystinum.

## NSÍ betur frá byrjan

Sjálvt um klaksvíkingar høvdu bóltin mest, so vóru tað runavíkingar sum skoraðu fyrsta málið. Í sjeynda minutti fær NSÍ fekk fríspark á miðjari KÍ hálvuni, sum Monrad H. Jacobsen sendi inn í brotsteigin, har Árni Frederiksberg fekk stýrt bóltin í málið.

Hóast um runavíkingar løgdu seg á odda, so hildu klaksíkingar á við at vera spælstýrandi. Ein sera vælspælandi Sámal Olsen á vinstra vongi hjá KÍ, var ein torn í holdinum hjá NSÍ verjuni.í fyrra hálvleiki. Tískil var tað eisini uppiborið tá KÍ javnaði í 23. minutti við máli frá Sámali Olsen, tá hann fekk eina sending afturum verjuna hjá NSÍ, og skoraði trygt.

Tað var sum um spælið dalaði nakað aftaná útjavnandi málið, tó at klaksvíkingar vóru spælstýrandi, meðan runavíkingar dúvaðu mest uppá snarálop.

## Sjálvmál avgjørdi finaluna

Eftir steðgin var leikliga gongdin tann sama. Leikliga yvirvágin hjá klaksvíkingum hevði eisini við sær at teir komu til fleiri góðar kjansir, men málroyndirnar høvdu ikki sama kvalitet sum uppspælið.

Sum dysturin leið javnaði spælið út og runavíkingar komu meira við í dystin, ikki minst takkað verið einum sera hart arbeiðandi Viggo Hansen á miðvøllinum hjá NSÍ, sum spældi ein branddyst.

Tá tað resta fimm minuttir av dystinum fær NSÍ hornaspark, sum Per Langgaard sendur innfyri, har ein klaksvíkingur er so óheppin at beina bóltin í egið mál.

Fleiri mál komu ikki í dystinum, sum runavíkingar sostatt vunnu 2-1, og kunnu kallað seg steypavinnarar í unglingadeildini 2010, meðan klaksvíkingar bert kunnu iðra seg um nógvu misnýttu kjansirnar og óheppni í verjupartinum, sum kostaði teimum sigurin.

post@sosialurin.fo